

# Leiðari til Dagstovnin við Botnánna í Kollafirði

Tórshavnar kommuna søkir eftir leiðara 40 tímar um vikuna til Dagstovnin við Botnánna í Kollafirði, at byrja 1. apríl 2008 ella eftir nærri avtalu.

Dagstovnurin við Botnánna er skipaður í eina barnagarðsstovu til 20 børn í aldrinum 5 til 7 ár og frítíðarskúla til 24 børn úr 1. og 2. flokki.

### Vit bjóða

- eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum, og har spælið fyllir nógv
- møguleika at seta dám á stovnin
- møguleika fyri ráðgeving og eftirútbúgving
- tú verður eisini partur av einum netbólki, sum kommunan skipar fyri millum dagstovnaleiðarnar

### Vit vænta at tú

- er útbúgvin pedagogur og hevur leiðsluroyndir
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir um virksemi á einum dagstovni, ið rúmar bæði barnagarði og frítíðarskúla
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir og sær møguleikar fram um vansar
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði

### Setanarviðurskifti

Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya.

### Meiri fæst at vita

um starvið við at venda sær til Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóra ella Katrin Petersen, deildarleiðara, telefon 30 20 10.

### Umsókn

saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 3. mars 2008.

**Tórshavnar kommuna**

# AT SÍGGJA VIÐ HJARTANUM

Leygardagin 1. mars varpa Sinnisbati og Psykiatriski Depilin ljós á støðuna hjá teimum avvarðandi. Úr ymiskum sjónarhornum verður støðan hjá teimum við sálartrupulleikum og teirra avvarðandi lýst.

· KENNIR TÚ ONKRAN VIÐ SÁLARSJÚKU?
· STRÍÐIST EIN AV TÍNUM NÆRMASTU VIÐ SÁLARTRUPULLEIKAR?
· TÁ TAÐ RAKAR Í TÍNUM NÆRUMHVØRVI – HVAT GERT TÚ TÁ?

### Á EVNISDEGNUM GEVA HESI SÍTT ÍKAST:

**Andrea Fisker, sálarfrøðingur:**
**Hevur tú gloymt, hvør eg eri?**
Ein fyrilestur um alt viðvíkjandi sálarsjúku, vit ikki tosa um.

**Annlis Bjarkhamar, samskipari:**
**At síggja við hjartanum**
Sum avvarðandi eru vit kensluliga knýtt at tí sálarsjúka. Hvussu ávirkar hetta okkum? Hvat hava vit, sum avarðandi, tørv á?

**Hallur Gilstón Thorsteinsson, cand.mag. í sálarfrøði og heimspeki:**
**Tá børn eru avvarðandi**
Fyrilesturin snýr seg um, hvussu sálarsjúka í familjuni ávirkar barnið, hvørji eykenni gerast sjónlig, og hvussu vit stuðla barninum á besta hátt.

**Jógvan Fríðriksson, bispur:**
**Vónin, eitt ískoyti til trivnað ella trivnaður?**
Tann ítøkiligi veruleikin er ikki alt avgerandi. Fatanin, - hugburðurin myndar lívið. Vónin er sum einar opnar dyr, ein møguleiki. Dagurin í dag er framtíðin, tá vónin leiðir ávegis.

**Esther Risstubben, verkætlanarleiðari:**
**Ein annar heimur er møguligur**
Hvussu skapa vit vón og lívsmátt innan sálarfrøðiliga viðgerð, har bæði tann sálarsjúki og tey avvarðandi eru ein virkin partur.

**Tórmóður Stórá, depilsleiðari:**
**Nærverandi avvarðandi**
Hvussu kunnu tey avvarðandi gerast ein natúrligur partur av viðgerðini hjá tí sálarsjúka?

Evnisdagurin er bæði fyri tey avvarðandi, tey við sálartrupulleikum og tey, sum starvast innan øki, har tey koma í samband við fólk við sálartrupulleikum og/ella teirra avvarðandi.

Lena og Niclas seta sín dám á dagin við tónleiki.

Norðurlandahúsið · Leygardagin 1. Mars kl. 9.00-16.00
Kostnaður: 400 kr (við í prísinum er eisini kaffi og ein máltíð á miðdegi)

Tekning á teldupostí: sinn@email.fo ella á tlf: 50 76 32
**Seinasta freist at tekna seg er hósdagin 21. Februar**

Les meira um evnisdagin á www.sinnisbati.fo

Við vón um góða undirtøku
**Sinnisbati & Psykiatriski Depilin**